Til rætta viðkomandi

Sum áhugaður og starvandi á dagstovnaøkinum í fleiri ár, loyvi eg mær at koma við nøkrum viðmerkingum til ætlaðu broytingarnar[1] í lógini um dagstovnar og dagrøktir frá 10. mai 2000.

Uppskotið sigur at. "§ 2, stk. 2 verður strikað." – verandi áseting sigur:
"Stk. 2. [2)] Landsstýrismaðurin hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina av dagstovnaøkinum, og landsstýrismaðurin veitir kommununum yvirskipaða námsfrøðiliga vegleiðing og ráðgeving, sbr. § 3, stk. 3."

Hendan broytingin hoyrir saman við ætlanini, at nýggj grein 5 a verður sett inn:

"§ 5 a. Kommunurnar skulu sjálvar ella í samstarvi við aðrar kommunur veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar. Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum. Stk. 2. Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv. Stk. 3. Landstýrissfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um samskipan millum námsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 1 og sernámsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 2, herundir reglur um upplýsingargongd og samstarv."

Landi vil við hesum sleppa yvirskipaðu ábyrgdin av at veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnaøkið – her kundu aðrar loysnir verið gjørdar. Eitt nú hevði borið til at lagt ein part út til NÁM at veita ráðgeving. Á tann hátt kundi ein reyður tráður verið skaptur millum dagstovn og skúla, samstundis sum munur ikki verður gjørdur á kommunum – stórar ella lítlar.

Væntast kann somuleiðis, at samlað verður broytingin ein dýrari samfelagsloysn, ið ger haldførið hjá tí almenna vánaligari. Um landið skuldi veitt námsfrøðiliga ráðgeving, hevði tað kunna ligið fyrst og fremst sum vegleiðing frá stovninum NÁM. Um NÁM eisini hevði ábyrgdina av at vegleiða út á dagstovnaøki, hevði tað verði við, at tryggja, at allir dagstovnar, og harvið børn, høvdu atgongd til somu vegleiðing.

Fyri sernámsfrøðiliga tilboðið er SERNÁM longu til staðar, og fyri aðra námsfrøðiliga ráðgeving eigur uppgávan at kunna loysast av leiðsluni á stovninum, ella í serligum føri at keypa ráðgeving so hvørt tað er neyðugt.

Um fleiri námsfrøðingar skulu setast í ráðgevarastørv, vera færri námsfrøðingar inni á dagstovnunum – og tá er lítið vunnið.

Um talan er um, at leiðslurnar eru ov illa klæddar at ráðgeva starvsfólki, kundi eitt krav um víðarilestur í námsfrøði og royndir verða sett leiðslunum.

---

[1] https://landsstyri.cdn.fo/savn/4prbbp4h/dagfoera-dagstovnalogina-281125.pdf?s=_q1aL9DX6HgfzsQyuWTYjL40JZc

Broytingin í grein 3 er skilagóð – tá verandi reglur, ið liggja í viðmerkingunum til dagstovnalógina upprunaliga hava somu aldursmørk. Her kundi tó eisini verið høvi at sett inn mark fyri, hvussu stórir barnabólkarnir kunnu gerast og sett eitt minstamark av starvsfólkum inn. Eins og tilmælið "Fyri barnsins besta" leggur upp til í partinum "Hóskandi starvsfólkaorka og stødd á barnabólkum". Hetta er longu gjørt við floksstøddum í fólkaskúlanum.

"Mælt verður til at seta ein arbeiðsbólk at lýsa arbeiðsuppgávurnar hjá dagstovnanámsfrøðingum. Hetta fyri at tryggja børnunum tíð við námsfrøðiligum innihaldi."[2]

Í barnagørðum og vøggustovum er spurningur oftani settur við, um talið av børnum í mun til starvsfólk er á tryggum ella ráðiligum støði. Her kunnu grundleggjandi spurningar um, nær trygdin hjá børnum og starvsfólkum á stovninum er sett í váða. Nær kann spurningur setast við, um til ber at veita eitt trygt ella ráðiligt námsfrøðiligt tilboð, eins og álitið "Fyri barnsins besta" eisini nevnir í partinum "Krøv til innandura og uttandura viðurskifti".

"Mælt verður til at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til dagføring av verandi krøvum hjá Arbeiðseftirlitinum og at gera eina vegleiðing, sum eisini tekur støði í námsfrøði, til tess at tryggja eitt gott innan- og uttandura barnaumhvørvi."[3]

Ætlanin at niðurleggja dagstovnaráðið, og harvið taka møguleikan at leita sær ráð hjá einum breiðum fakligum ráði, er ein óheppin gongd. Um talan var um fólkaskúlaráðið hevði hetta ikki komið uppá tal. At seta eitt samstarvsráð tykist sum at viðurkenna, at ráðgevingin og viðurskiftini millum land og kommunur bert eru av fíggjarligum og skipanarligum slag og als ikki hevur nakrar námsfrøðiligar/fakligar hugsjónir um framtíðar dagstovnavirksemi. Uttan eitt dagstovnaráð er eingin skipað ráðgeving til landsstýrisfólkið í dagstovnamálum, ið hevur evstu ábyrgd av økinum.

Eitt dagstovnaráð eigur at vera varðveitt, men kundi væl verið umskipað á tann hátt, at tað gjørdist eitt meira fakligt ráð heldur enn eitt "umboðandi" ráð, soleiðis sum tað er í dag.

Vónandi verða hesar viðmerkingar tiknar við í viðgerðini av ætlaðu broytingunum.

Jógvan Philbrow

[2] https://landsstyri.cdn.fo/savn/17789/tilmaeli-fyri-barnsins-besta-25-januar-2023-dagstovnar%C3%A1%C3%B0i%C3%B0-tilm%C3%A6li.pdf?s=wMGeoxiPlKO-lwA_8S7t_p4DSMY
[3] Aftur álitið "Fyri barnsins besta"